# Starvsfólk
## til farmadeildina

**Søkt verður eftir starvsfólki til farmaavgreiðsluna og farmasøluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.**

**Arbeiðið**
Starvsfólkið fer at virka í samstarvi við avgreiðsluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum í Vágum og hevur ábyrgdina av at:

· Avgreiða farm og selja farmaflutning
· Røkja farmakundar
· Avrokna farm
· Gera hagtøl og ansa eftir at sett mál verða rokkin

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir fólki, ið áður hevur fingist við at avgreiða farm. Tað er ein fyrimunir, um tú eisini hevur kunnleika til at avgreiða flogfør. Somuleiðis er tað ein fyrimunir, um tú hevur skeið í at handfara vandamiklan farm.

**Annars leggja vit stóran dent á:**
· Góð samstarvsevni og ágrýtni
· Sjálvstøðugt arbeiðslag
· Hugin at arbeiða ymsar tíðir á samdøgrinum.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn skal vera send Atlantic Airways í seinasta lagi 15. desember 2004.

**Send umsóknina til:**
Atlantic Airways, 380 Sørvágur

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Marius Davidsen á telefon 34 10 00 ella 21 37 03.

SANSIR 355 355

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin Sólareygað**

Á dagstovninum Sólareygað fara at ganga 48 børn.

Stovnurin er skipaður við 4 vøggustovum við 12 børnum í hvørjari. Aldursbýtið verður tó broytt alt eftir tørvi.

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

## Tvey reingerðsfólk og eitt fólk til køkshjálp
**- til nýggja Dagstovnin Sólareygað á Sundsvegnum.**

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin Sólareygað eftir**
- tveimum reingerðsfólkum at arbeiða 15 tímar um vikuna at byrja 17. januar 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einum fólki til køkshjálp at arbeiða 15 tímar um vikuna at byrja 1. februar 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarvíðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við avvarandi fakfelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Mirjam Johannesen, stovnsleiðara, tlf 273880.

**Umsókn**
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi seinast mánadagin 20. desember 2004.

---

# Almannastovan

## Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.
Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
Fylgjarauppgávur Stimbran Umlætting

**Størvini eru hesi:**

**Tórshavn**
1)– at stuðla og hjálpa eini 5 ára gomlum fjølbrekaðum drongi á allan hátt, við venjingum og spæli og fara við honum til viðgerð.

Arbeiðið er í heiminum hjá barninum og við tilknýti til dagstovn.

Tímatali er **30 tímar um vikuna**, skiftandi morgun og seinnapart.

**Neyðugt er, at tann í settur verður hevur koyrikort.**

Eisini verður søkt til sama barn, **eftir avloysara fyri stuðulsfólk í barnsburðarfarloyvið.**

Arbeiði er náttarvakt 3 og 2 nætur um vikuna.

2) – stuðulsfólk til 3 ára gamlan drong, **10 tímar um vikuna.**

Arbeiðið hjá stuðlinum er at umlætta familjuna.

Arbeiðstíðin er skiftandi, tó mest seinnapartar og tíðliga kvøld.

**Eysturoy**
3) – at stuðla og stimbra einum 7 ára gomlum drongi.

Arbeiðið verður gjørt heima hjá barninum, í útibarnagarði og við tilknýti til Rók í Saltnesi.

Tímatali er **35 tímar um vikuna, men verður tímatalið væntandi broytt til færri tímar frá 01.03.05**

4) – **lýst verður eftir avloysara fyri stuðulsfólk í barnsburðarfarloyvið.**

Arbeiðið er at stuðla og hjálpa eini 7 ára gamlari rørslutarnaðari gentu.

Arbeiði er fyri tað mesta fyrrapartar og fer fram í heiminum hjá barninum.

Tímatalið er **20 tímar um vikuna.**

**Sandoy**
5) – at stuðla, stimbra og við miðvísari venjing hjálpa einum 4 ára gomlum fjølbrekaðum drongi.

Arbeiðið er **40 tímar aðru hvørja viku** og skal stuðulin m.a. fara við barninum til Havnar til viðgerðir.

**Neyðugt er at tann í settur verður hevur koyrikort.**

6) – at stuðla og hjálpa einum 7 ára gomlum drongi.

Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum og er m.a. einaferð um vikuna at fara við honum til viðgerð í Havn.

Tímatali er **12 tímar um vikuna**

Setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ragnhild Dahl á tlf.nr. 35 35 10, gerandisdagar millum klokkan 09:00 og 15:.00.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða

**Almannastovuni**
J. Broncksgøta 27
Postboks 3096
110 Tórshavn

í hendi í seinasta lagi 21.12.04

Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.

---

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!